VIÐMERKINGAR

# Hettar vil eg arbeiða fyri

**Steinfinnur Mittelstein**
*Valevni Sambandsfloksins til Tórshavnar býráð*



Nógv er gjørt seinastu árini, og hóast nógv er eftir, eigur sitandi býráð rós fyri tað sum er hent, tað kann ikki bara verða funnist at - sum nakrir politakarar sýnist gera - tí seinastu árini eru vit vælsignaði við framgongd, nær um á øllum økjum.

Sambandsflokkurin gevst ikki her:

- Fyri at skapa vøkstur, er umráðandi, at kommunan skapar betri trivnaðar-møguleikar fyri øll - bæði ung, gomul og brekað.
- Tørvurin á heimum til heimleys er ikki nøktaður enn. Hóast evnið hevur verið at hoyrt javnan, so er onki hent á hesum økinum enn. Tað er eldsálir, ið eiga lívið í tí, sum er at bjóða heimleysum í býnum.
- Tørvurin á spælistøðum til tónleikarar hevur ofta verið kjakast um, men tað blívur bara við kjakið. Her skal skjøtil setast á, so tónleikalívið í býnum fær sømulig kor at virka undir.
- Ítrótturin sigst fáa nógv, men í fleiri ítróttar greinum stendur ikki væl til við venjingar møguleikum. Her eigur at raðfestast, so allar ítróttargreinir, fáa nøktandi umstøður at mennast undir.
- Ungdómurin eigur at hava møguleikar í nærumhvørvinum, og tí skulu ungdómshús verða tikin við, tá kommunan leggur økir av til íbúðarbygging og planleggur.
- Betri parkeringsmøguleikar í býnum. Tað er ein fyritreyt, um handilslívinum skal vera lív laga.

Her manglar nógv enn, og tí er umráðandi at tú stuðlar Sambandsflokkin, so tú fær trygd fyri, at arbeiði verður gjørt liðugt.

Hettar kanst tú gera av 9. november.

# Ferðsla og parkering

**Sjúrður Olsen**
*Býráðslimur*



Seinastu 4 árini er nógv gjørt fyri at betra um ferðslu- og parkeringviðurskiftini í býðnum. Arbeiðast má framhaldandi fyri at betra enn meira um hesi viðurskifti.

Enn fleiri rundkoyringar skulu gerast. Arbeiði uppá Ytra Ringvegin eins og Glyvursvegin eigur at gerast liðugt, soleiðis at ferðslan kann verða meira javnað runt um í býnum.

Smærri parkeringspláss eru gjørd ymsa staðni í býnum, og skulu enn fleiri gerast,so parkeringsforboð kann verða sett á størri vegunum.

Við nýggja sáttmálanum er lætt at útbyggja bussleiðuna, so hon kann koma at virka enn betur í framtíðini.

Útbygt vegakerv og harvið betur ferðsluviðurskifti er nakað eg vil arbeiða fyri.

# Frælsar ítróttir – nú má veljast!

**Robert Vilhelmsen**
*Valevni Javnaðarfloksins - listi C*



Skulu frælsar ítróttir í Føroym hava lív lagað, má ein loysn veljast skjótast gjørligt. Hetta val má grundast á ítøkiligar og óheftar kanningar av ymiskum møguleikum og tí má ein arbeiðsbólkur til verka beinanvegin eftir valið. Arbeiðssetningur fyri bólkin skal, sum tað fyrsta, gerast og góðkennast av øllum pørtum innan kanningararbeiði byrjar.

Kanningin kann gerast eftir niðanfyri standandi leisti í trimum stigum:

1. Kravfesting til eitt stadion, har allir áhugabólkar verða hoyrdir
2. Lýsing og kostnaðarmeting av 2-3 møguleikum, grundað á kravfestingina
3. Tilmæli og val av loysn

Henda kanning skal tryggja, at vit velja eina virðiliga loysn við framtíðini í huga. Við einum stadion, ið lýkur altjóða krøv kunnu vit aftur bjóða okkum fram til at vera vertir fyri Oyggjaleikum og øðrum stórum ítróttartiltøkum á altjóða støði. Slík tiltøk hava ómetaligan týdning fyri mentanarlívið, vinnulívið og menningina av frælsu ítróttini.

Við tínum stuðli og atkvøðu fer hetta at vera eitt av mínum fremstu málum at fremja í Tórshavnar kommunu.

Tryggleiki og lívsvirði - *til allar borgarar!*

# Íbúðarmál

**Sigurð S. Simonsen**
*Valevni á lista B*



Undan valinum seinast, var íbúðarmál eitt av teimum málunum ið hevði størst áhuga, ja eitt av aðalmálunum. Hetta er eisini eitt øki sum nógv orka er brúkt uppá hesa setuna. Vit mugu samstundis ásanna, at vit høvdu ikki hóming av, at tað var eitt so drúgt og torført arbeiði at gera kommunalar útstykkingar.

Loksins kunnu vit tó gleðast um, at nú er klárt at seta spakan í útstykkingina frá Toftabønum yvir Bakkageilina og suðureftir. Vegagerðin byrjar frá endanum á Bjarnavegnum við húsini hjá Torkil Beder.

Í hesum sambandi kann upplýsast, at arkitektarnir Rúni Abrahamsen og Eyðun Eliasen hava gjørt uppskot um hvussu byggjast kann á øllum økinum, líka suður til Kirkjugjógv. Hetta øki verður mett at umfata umleið 60 hús og íbúðir.

Kommunan eigur tó bert eini 25% av umtalaða lendi.

Útstykkingin Vestur í Bø gongur sína gongd. Stovugerðisvegur er ávegis gjørdur og fluttu tey fyrstu fólkini inn í húsini í fjør. Vegurin ímillum Stovugerði og Innandalsvegin var boðin út í fjørheyst, men boðið var tikið aftur tí ognarviðurskiftini ikki komu uppá pláss. Vantandi fellur avgerðin í málinum skjótt, soleiðis at vit um stutta tíð kunna hava 12 grundstykkir afturat teimum 8, soleiðis at eini 20 hús koma við í hesa útstykking.

Býráðið hevur samtykt at gera eina útstykking uppá 8 grundstykkir á Kambsdali, henda skal gerast liðug í hesum árinum.

Á Kambsdali hava annars verið gjørdar fleiri royndir hesi 4 árini, við ímillum annað einum íbúðarblokki í fleiri hæddum, tvær verkætlanir við tví- og raðhúsum, men onki er komið burturúr. Roknast kann við, at okkurt av hesum kann vera tikið framaftur, tá lógin um alternativa íbúðarbygging verður avgreidd í Løgtinginum.

Samanumtikið kann sigast, at góð útlit eru fyri at eini 20 grundstykkir vera tøk í vár og út á summarið, umframt tey á Kambsdali.

Býráðið hevur útskrivað 33 byggiloyvir til sethús hesi síðstu 4 árini og eru tey flestu bygd. Men byggihugurin er stórur og bíðilistin heldur veksur enn minkar. Í løtuni eru oman fyri 50 umsøknir inni.

Góðu fuglfirðingar, um eg veri valdur innaftur í býráðið, vil eg leggja doyin á at omanfyri nevndu verkætlanir halda fram og helmi ikki í, fyrr enn bíðilistin er burtur og kommunan til einhvørja tíð hevur grundstykkir tøk til tað unga fólkið íð her býr og til fólk sum koma til bygdina.

# Byggið og verjið virðini

**Jónas Johnsson**



Kommunan er ikki bara tann ´deiliga´ Havnin, men eisini bygdir og oyggjar; firðir, áir og vøtn; haga — og fjallalendi og onnur dýrabar náttúra. Vit eiga at røkja hana og øll virðini á skynsaman hátt.

Fleiri grundstykkir mugu útstykkjast íroknað í Kollafirði. Men vit mugu varðveita og økja dyrkilendini. Nakrar líðir eru helst nýtiligar og stykkini gjørdust bílig við panorama útsikt. Knáu vestmannakonurnar fóru í hæddina og vístu vegin. Stremban eftir handikap vinsemi skal vera sjálvsagt, tá vit byggja.

Leiguíbúðir vanta! Bingjur lagast høgt á skipini. Hugsa vit ´smátt og gott´, kundu smá-íbúðir líknandi verði lagaðar sum lego frá mongdar framleiðing. 1-stjørnaða smáttan fæst ikki bíligari! Hugsa tær 5-6 blokkar hvør við 20-30 lego-lagaðum íbúðum í rundingi í Marknagili og vindstillum rundtorgi innií!

Hús og vegir er hart økið. Í Kollafirði vanta bæði gongu-, súkklu og koyribreytir. Tørvurin er sjálvandi nógvastaðni. Gakk t.d. eftir Hoyvíksvegnum við A C Evensensgøtu, og tú skilir tað.

Landsstýrið má eisini støðugt minnast á lógir, sum órøktaðar forða okkum bestu korini. Skattalógin kundi t.d. sundurliðað botnfrádráttin í kommunuskattinum, soleiðis at tær lægstu inntøkur fingu ein hægri frádrátt. Og so hvørt sum inntøkan gerst størri, verður botnfrádrátturin lægri, og kanska null til tær allar hægstu inntøkurnar. Tó eigur at kompenserast við lægri skattaprosenti til øll. Stýrini áttu at fingi hendan møguleikan við rættvísum lykli. Týdningarmest er tó, at borgarin gleðist um sín borgaraskap, og sær, at fleiri og fleiri fáa tað góða lívið, soleiðis at alsamt færri fáa brúk fyri okkaru allarhægstu raðfesting, sum er at raðfesta tey, sum eru illa fyri. Vel tí trygt tín býráðslim úr Sjálvstýrisflokkinum. Tú og tíni fáa tað betri við sterkum lista D.

- Burtur við bíðilistanum til kommunal grundstykkir.
- Næmingaheim til tey lesandi og lærlingar.
- Betri kor bæði fyri leigarar og útleigarar.
- Betri kor at byggja alternativar íbúðir hjá sjálvsognarstovnum, feløgum og øðrum.
- Uppvenjing og viðlíkahald til heimabundin lamin og lammað.

Gott val øll somul



VIÐMERKINGAR

# Arbeiðspláss og aftur arbeiðspláss

**Hjalmar Magnussen**
*Valevni fyri Javnaðarflokkin til býráðsvalið í Vági*



Seinastu 10 - 15 árini hava ikki verið tey bjartastu í Vágs søgu. Bygdini tørvar nýggjar kreftir og hugsjónir, ið vilja og tora at skoða frameftir og at taka neyðug tøk.

Stórar avgerðir hava verið á borðinum og koma eisini framyvir at mynda býráðspolitikkin. Tað, ið bygdini fyrst og fremst tørvar, fyri at fólk kunnu virka og trívast, eru arbeiðspláss og aftur arbeiðspláss.

Spurningurin um ellisheim eigur avgjørt at verða tikin í álvara og eitt krav er, at spurningurin verður viðgjørdur á virðiligan hátt og eiga kommuna og borgarar at finna loysn á hesum málinum.

Miðnámsskúli verður bygdur í Vági og eiga ellisheim og skúli ikki at samantvinnast til eitt mál, so talan verður um orðataki; annaðhvørt, ikki bæði.

Kommunuskattaprosentið eigur at endurskoðast. At hava eitt hitt hægsta kommunuskattaprosentið í landinum, er at leggja stein oman á byrði í eini kommunu, har fólk frammanundan hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman vegna vantandi virksemi í Suðuroyar syðru helvt. Og havast skal í huga, at kommunuskatturin eigur í so vítt møguligan mun at endurspegla tað, ið borgarin fær aftur í gerandisdegnum, so sum dagførd barnaansingarskipan og barnagarður, vegir og annað.

Ungdómurin eigur framtíðina. Teir gomlu tóku tøk, so suðuroyggin taldist millum fremstu øki í landinum, og verður mangan við stoltleika víst á hetta. Men hetta breyðføðir ongan í dag og eigur ungdómurin í dag at fáa karmar og treytir, so liviligt er í kommununi, bæði innan miðnámsútbúgving, frítíðartilboð, mentanartilboð og arbeiði. Hetta, og at vinnan fær góðar karmar, er altavgerandi.

Vágbingar mugu standa saman. Saman skulu vit at venda gongdini. Saman skulu vit virka fyri at koma burturúr naggatódnini. Samanhald er styrki.

# Ferðslan í Havn

**Terji Nielsen**
*Valevni fólkaflokksins til Býráðið í Havn*



Tað er einki dulsmál, at ferðsluviðurskiftini í Havn ikki eru av teimum bestu. Serliga eru tað fótgangarar og fólk á súkklu, ið eru við sviðið soð. Umstøðurnar hjá hesum bólkum eiga at gerast betur.

Sitandi býráð hevur tikið stig til at gera tryggari skúlavegir. Gonguteigar, ið eru lyftir upp, eru gjørdir við skúlarnar, soleiðis at neyðugt er hjá bilførarum at minka um ferðina. Harvið gerst tað tryggari hjá skúlabørnunum at ferðast yvir um vegin. Hetta er eitt stig á leiðini. Kanska hevði tað eisini verið eitt hugskot at sett á stovn skúlapatruljur, har tey elstu børnini í skúlanum syrgdu fyri, at tey smærru komu trygt yvir um vegin uttan fyri skúlan.

Spurningurin er eisini, um tað ikke hevði verið eitt gott hugskot at stongt gongugøtuna og Dr. Jacobsensgøtu fyri ferðslu. Hetta er jú púra vanligt í øllum grannalondum okkara, so at fólk, ið eru til handils, kunnu ganga í frið og náðum í handilsøkjunum uttan at noyðast at hugsa um ferðsluna. Her krevst tó ein hugburðsbroyting, tí føroyingurin er nú einaferð soleiðis, at hann vil helst seta bilin beint uttan fyri handilshurðina.

Somuleiðis eigur býráðið at taka stig til, at umstøðurnar at ferðast á súkklu eru so góðar sum gjørligt, bæði hjá vaksnum og børnum. Í sambandi við býarplanlegging er neyðugt at hava súkklubreytir í huga. Nú nýggjur skúli verður bygdur í Hoyvík, haldi eg, at býráðið skal taka stig til, at súkklubreytir verða gjørdar millum skúlan og teir býlingar, ið skúlabørnini búgva í. Hetta hevði helst eggjað børnunum til at súkkla í skúla, og tað hevði lætt munandi um ferðsluna, og harafturat hevði tað eisini verið sunt fyri børnini.

Verið eg valdur í Tórshavnar Býráð, vil eg m.a. arbeiða fyri:

- at skúlabørnini hava trygt at ferðast til og frá skúla
- at ferðslan í miðbýnum verður tálmað munandi
- at fleiri vegforðingar verða gjørdar, har tær eru neyðugar, fyri at fáa bilførarar at minka um ferðina
- at umstøðurnar hjá fótgangarum og fólki á súkklu gerast betur
- fleiri fótgangarateigar verða gjørdir á støðum við nógvari ferðslu

# Íbúðarbygging, ið kann fíggjast

**Sámal í Gong**
*Valevni á lista H til býráðsvalið*



Verandi býráðssamgonga hevur einans lagt seg eftir, at einstaki borgarin sjálvur skal standa fyri at útvega sær bústað við keyp av dýrum grundstykki ella keyp av dýrum og lítið áhugaverdum raðhúsi. Onnur tilboð skulu fremjast, har kostnaðurin skal á eitt støði, har møguleiki eisini er at fáa fígging frá peningastovnum.

Væl ber til at byggja rationellar og einfaldar bústaðir í meiri enn tveimum ella trimum hæddum, og bygging kann eisini fremjast meiri áhugavert enn gjørt er seinastu árini.

Hugsast skal um tey støku, ið sjálvandi eisini skulu hava møguleika at ogna sær eina 60 til 70 fermetra íbúð – ikki til eina millión men helvtarprís og undir tað.

Sera væl ber til at skipa íbúðarblokkar og terrassubygging, har lendi og kringumstøður gera hetta møguligt, og eisini ber til at fremja eina áhugaverda og liviliga íbúð, uttan at talan skal verða um triðjafloks bústaðir ella øki, har tey fámentu skulu trunkast saman.

Við krossinum til mín, skulu tit verða vís í, at annað skil skal koma á, og fleiri og fjølmentari tilboð skulu verða útvegað.

# Skúlarnir á Tvøroyri, steingjast?

**Finnleif Guttesen**
*Býráðslimur og valevni*



Hetta er bygningar, sum kommunan hevur alla ábyrgdina av. Her búleikast okkara ungdómur frá fyrsta til tíggjunda flokk og skulu umstøðurnar sjálvsagt verða so góðar sum gjørligt, fyri at fáa eitt gott umhvørvi fyri næmingar og lærarar.

Tey seinastu fýra árini eru umvælingar farnar fram fyri fleiri milliónir krónur. Serstakliga er tað útskifting av tøkum og klædningi sum eru gjørd, tí tað lak so illa, "at ein næstan mátti ganga við paraply og gummistivlum í skúlunum".

Og áðrenn størri umvælingar kunnu fara fram, má tað sjálvsagt vera tætt fyri regni og vindi.

Tíverri er støðan á gamla skúla so vánalig, at vandi er fyri, at hann skal steingjast. Hetta má ikki henda og tí má eitt komandi býráð, planleggja og avseta neyðuga fígging so tað munar, til at nýtímansgera skúlarnar.

# Sambýlið – endiliga gav tað úrslit

**Tummas Eli H. Joensen**

Ein borgarafundur var á Strondum fyri eini tíð síðani. Her fekk bygdarráðið eina greiða ábending um, at ein broyting mátti fáast í raðfestingina hjá kommununi. Fólkið á fundinum gav klárt til kennar, at tað tey vildu hava, var eitt sambýli. Viljin hjá fólkinum var, at hetta sambýlið skuldi setast fyrst á dagsskránna. Fleiri av bygdarráðslimunum góvu, á fundinum lyfti um, at ein broyting skuldi gerast í raðfestingini.

Eina tíð eftir hendan fundin, fekk bygdarráðið eisini hópin av undirskriftum, ið talaðu fyri, at her var eitt stórt ynski um at fáa hetta sambýlið bygt.

Tey eldru vístu okkum bygdarráðslimum, at tað at tey hava klárað sjálvi at fingið til vega og rikið eitt pensionistahús, ikki var eindømi um, at tey høvdu ein sterkan vilja og handlikraft.

Tey hava víst okkum ungu, at vil ein nakað, so er at bretta upp um armar og fara í gongd. Hetta er rós vert og mugu vit ungu taka hetta til okkum sum virðismiklan lærdóm og barlast til framtíðina.

**Hvussu hevur gingist eftir hetta?**

Bygdarráðið samt um, at eitt sambýli skal byggjast. Eftir eina slíka semju, er nógv at fáa uppá pláss og tí, tíverri fyri tann ótolna borgaran, tekur hetta alt ov langa tíð.

Vit kunnu nú staðfestað, at avgerð er tikin um, hvar sambýlið skal byggjast. Grundøkið er fingið til vega og projekteringin er komið langt ávegis.

Tí kunnu vit í Sjóvar kommunu fegnast um, at eitt sambýli verður bygt, og vit kunnu gera okkum klár til at verða til staðar, tá spakin skal setast í.